LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Løgmálaráðið og Almannamálaráðið

Tórshavn, tann 1. november 2024
J.Nr.: LUM-16- 24/01298-7
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Viðvíkjandi eldraøkinum, herundir Eldralógini og Tvingsilslógini**

Umboðsmaðurin hevur verið á eftirlitsvitjan á tveimum røktarheimum, sum hava deildir til fólk við demens.

Eftirlitsvitjaninar á røktarheimunum vórðu rættaðar móti støðuni hjá persónum við týðandi sálarligum virkistarni, demens, sum búgva á stovni, teirra sjálvsavgerðarrætti og inntrivum, sum tey ikki geva ella hava førleikar at geva samtykki til.

Í sambandi við eftirlitsvitjaninar kunnaði umboðsmaðurin seg um, í hvønn mun stovnarnir, í tíðarskeiðnum síðani 2021, tá tvingsilslógin kom í gildi, og til og við 2023, høvdu søkt Kærustovnin um góðkenning til tvingsilsinntriv. Umboðsmaðurin hefti seg í hesum sambandi við, at tað einamest var Almannaverkið, sum søkti um góðkenning til inntriv, sambært Tvingsilslógini, meðan tað vóru merkisverda fáar umsóknir um góðkenning av inntrivum frá kommunalu stovnunum á eldraøkinum.

Undir eftirlitsvitjanunum kundi staðfestast, at inntriv í eginfrælsið, sum krevja góðkenning frá Kærustovninum, so sum serligar upplatingarskipanir, ávaringarskipanir og peiliskipanir í nøkrum førum vórðu sett í verk uttan góðkenning. Víst verður til hjáløgdu frágreiðingar, sum lýsa hesi viðurskifti.

Umboðsmaðurin fekk ta fatan, at orsøkin til at stovnarnir ikki høvdu søkt um góðkenning av inntrivunum var, at stovnarnir ikki høvdu verið við á fyrireikinunum at seta Tvingsilslógina í gildi, og tí í byrjanini ikki høvdu greiða fatan av skipanini, og at tey hildu, at góðkenningarskipanin í Tvingsilslógini (lóg nr. 73 frá 25. mai 2020 um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin) var umsitingarliga trupul og tíðarkrevjandi. Eisini hildu tey, at Tvingsilslógin burdi verið eftirmett. Í hesum sambandi varð víst á, at síðani Tvingsilslógin varð sett í gildi í Føroyum, hevur man í Danmark gjørt broytingar á hesum øki, so m.a. nýtsla av ávaringarskipanum og peiliskipanum til dement fólk undir ávísum umstøðum, ikki verður bólkað sum tvingsilsinntriv, men sum ein partur av umsorganini.

Viðmerkjast skal, at á fundi, sum umboðsmaðurin hevði við Alzheimerfelagið, áðrenn eftirlitsvitjaninar, viðmerkti felagið eisini, at tey hildu, at galdandi lóg um Tvingsil trongdi til eina dagføring, so viðurskiftini gjørdust meir smidlig. Víst varð m.a. á, at tørvur er á, at vælferðartøkni, sum stuðlar undir trygdina og harvið kann geva størri frælsi til fólk við demens, burdi verið partur av umsorganin, uttan at hetta skuldi viðgerðast sum inntriv, sambært Tvingsilslógini.

Kærustovnurin er í nøkrum førum góðkenningarmyndugleiki og í nøkrum førum kærumyndugleiki í mun til inntriv, sambært Tvingsilslógini, men Kærustovnurin hevur ikki eftirlit við, um stovnar, sum fyriskrivað í Tvingsilslógini, søkja góðkenning til tvingsilsinntriv. Tað er landsstýrismanninum í lógarmálum, sum hevur Tvingsilslógina sum umsitingarøki. Einki er ásett í Tvingsilslógini um eftirlit.

Virksemið hjá røktarheimum fyri eldri er undir ábyrgd hjá avvarðandi kommunu, og tænasturnar skulu veitast samsvarandi Eldralógini (lóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m.). Í § 19 í Eldralógini er ásett, at kommunurnar hava eftirlit við bústøðum, tænastum og tilboðum, sambært Eldralógini, og at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um eftirlit. Vegna manglandi reglur frá landsstýrismanninum í almannamálum, er tó einki eftirlit skipað hjá kommununum. Hetta havi eg áður víst á í hjálagda skrivi til Almannamálaráðið, dagfest 24. apríl 2023.

Vísandi til omanfyristandandi um inntriv, sambært Tvingsilslógini, haldi eg tað vera sera ørkymlandi, at tað í løtuni hvørki er fyriskipað nakað eftirlit á eldraøkinum ella sambært Tvingsilslógini, sum hevur eftirlit við støðuni á eldraøkinum m.a. í mun til inntriv, sambært Tvingsilslógini.

Eg fari tí at heita á landsstýriskvinnuna í almannamálum um at skipa reglur um eftirlit á eldraøkinum.

Eg fari samstundis at heita á landsstýrismannin í lógarmálum um at meta um tørvin á eftirliti í mun til inntriv, sambært Tvingsilslógini, og at umhugsa, hvørt tørvur er á eini eftirmeting av Tvingsilslógini. Vísast kann í hesum sambandi á kunngerð nr. 226 frá 2020 um námsfrøðiligt eftirlit, sum er galdandi fyri tænastur sambært lógini um almannatrygd og sum í mun til almannaøkið hevur áseting um eftirlit við inntrivum sambært tvingsilslógini .

Vinarliga



Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður